# Atlantic Petroleum framleiðir nú úr tveimum brunnum á Chestnut-oljuleiðini




**Atlantic Petroleum fráboðar í dag, at annar framleiðslubrunnurin á Chestnut oljuleiðini í enskum øki nú er knýttur uppí framleiðslukervið, og harvið er dagsframleiðslan úr leiðini økt til umleið 2.150 tunnur av oljueindum (boepd) netto til Atlantic Petroleum.**

OLJUFRAMLEIÐSLA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Út frá góða framleiðsluúrslitinum og metingum av goymsluni er mett, at nøgdin av olju, sum kann framleiðast úr leiðini, nú er munandi økt, sammett við áður mettu framleiðslubarunøgdina upp á 1,5 milliónir tunnur netto til Atlantic Petroleum. Hetta stendur á heimasíðuni hjá Atlantic Petroleum.

Atlantic Petroleum eigur 15% í teigi 22/2a, har Chestnut leiðin liggur.

Byrjað varð at framleiða úr Chestnut leiðini 20. september 2008, við einum framleiðslubrunni, og einum vatninnspræningarbrunni knýttum uppí Hummingbird framleiðslupallin (FPSO). Í mai 2008 varð avgjørt at bora annan framleiðslubrunnin. Byrjað varð at bora brunnin í september, og í november varð brunnurin royndur. Hetta merkir, at tað gingu minnið enn 10 mánaðir frá, at avgerðin at bora brunnin varð tikin, til brunnurin varð knýttur uppí framleiðslukervið.

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum sigur:

»Framleiðslan úr Chestnut leiðini lá longu í ovara enda av, hvat vit høvdu roknað við. Við at knýta hendan seinna brunnin uppí leiðina vísir Chestnut seg at vera ein sera týdningarmikil ogn. At arbeiðið við at fáa hendan seinna brunnin í framleiðslu hevur gingið so skjótt vísir tøkniligu nýhugsanina hjá samstarvsbólkinum.

Góða framleiðsluúrslitið og øktu goymslurnar staðfesta okkara avgerð um at útbyggja Chestnut-leiðina við Hummingbird-framleiðslupallinum, tí fyrsta av sínum slagi í enskum øki.«

## FAKTA

**Chestnut leiðin**
Rakt varð við Chestnut leiðina í 1986

Chestnut liggur á leið 180 kilometrar eystanfyri Aberdeen, á 120 metra dýpi, og 13 kilometrar í ein landsynning úr Alba-oljuleiðina.

**Samstarvsfeløg í Chestnut-leiðini eru:**
Venture Production plc (fyristøðufelag) – 69,875%
Bow Valley Petroleum (UK) Limited – 15,125%
Bow Valley Petroleum (UK) Limited – 15,125%
Atlantic Petroleum UK Limited – 15,000%

Atlantic Petroleum keypti 15% av Chestnut-oljuleiðini í 2003.

Útbyggingarætlanin fyri leiðina, við einum framleiðslubrunni og einum vatninnspræningarbrunni, varð góðkend seint í 2005.

Vatninnspræningarbrunnurin (22/2a-12) varð boraður mitt í 2006, og vísti gott samband við tann upprunaliga framleiðslubrunnin.
Fyrsta framleiðslan úr Chestnut-leiðini var 20. september 2008 Sevan Hummingbird

Hummingbird-framleiðslupallurin (Sevan 300 FPSO) lastar 270,000 tunnur. Pallurin kann hava eina dagsframleiðslu upp til 30.000 tunnur av oljueindum (boepd), og kann spræna inn 20.000 tunnur av vatni um dagin.

MÁLARAMEISTARI SP/F
Niels Sørensen
TLF. 31 28 46 & 21 88 46
nielss@post.olivant.fo




Tórshavnar kommuna veitir stuðul á hvørjum ári til heilsu- og umhvørvistiltøk.

**Stuðul verður latin til verkætlanir sum:**
- Menna vitanina um heilsu og/ella umhvørvi
- Virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella avmarkandi
- Virka orku – og tilfeingissparandi
- Kunna almenningin um heilsu- og/ella umhvørvisviðurskifti
- Verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg

Til ber hjá stovnum, virkjum, feløgum og einstaklingum at søkja um stuðul, telefon 30 20 10.

Umsóknarblað og reglugerð fáast á www.torshavn.fo ella í Snarskivuni.

Umsóknir skulu verða hjá Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 1. apríl 2009 og skulu sendast til:

**Tórshavnar kommuna**
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32
110 Tórshavnar kommuna

Stuðulin verður latin í umhvørvisvikuni, sum verður 4. til 10. mai 2009.

Tórshavnar kommuna

## Umhvørvisvirðislønin 2009

Fyri fyrstu ferð fer Tórshavnar kommuna í ár at lata eina serliga umhvørvisvirðisløn. Hetta verður gjørt í Umhvørvisvikuni, sum er frá 4. til 10. mai 2009, og virðislønin verður latin onkrum, ið hevur gjørt nakað serligt fyri umhvørvið.

Umhvørvisvirðislønin, sum er áljóðandi 10.000 krónur, kann latast einum stovni, virki, felagi, bólki ella einstaklingi í Tórshavnar kommunu.

Veitst tú um onkran, sum við einum ella fleiri átøkum hevur gjørt eitt gott arbeiði fyri umhvørvið, kanst tú venda tær til kommununa við tínari innstilling. Eisini ber til at innstilla seg sjálvan.

Send tína innstilling til Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 17. apríl 2009, har tú fortelur eitt sindur um, hvønn tú innstillar, hví viðkomandi skal innstillast og hvønn kommunan kann venda sær til fyri at frætta nærri.

Oyðublað til innstillingina kann takast niður á www.torshavn.fo ella fáast í Snarskivuni, telefon 302010. Innstillingar skulu sendast til:

**Tórshavnar kommuna**
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32 · 110 Tórshavn
torshavn@torshavn.fo

Tórshavnar kommuna